Heilsu- og orkumálaráðið

Dagfesting:	24.04.2026
Mál nr.:	26/10100-27
Málsviðgjørt:	BL, JS, IN
Ummælistíð:	N/A
Eftirkannað:	16.04.2026

Uppskot til

Løgtingslóg
um
at útvega nýggjan bygning til Sjúklingahotellið í Keypmannahavn

§ 1. Landsstýrisfólkinum verður heimilað at samstarva við danskar myndugleikar um verkætlan at útvega nýggjan bygning til Sjúklingahotellið í Keypmannahavn.
Stk. 2. Heimildin fevnir um tíðarskeiðið fram til og við verkætlanaruppskot.
Stk. 3. Verður verkætlanin av ongum, rindar landið fyri útreiðslurnar, sum eru hildnar, tó í mesta lagi 10 mió. kr.

§ 2. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 1. januar 2029.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Í sambandi við at farið verður undir at fyrireika at byggja ein nýggjan bygning til Sjúklingahotellið í Keypmannahavn, er neyðugt at seta eina heimildarlóg í gildi, sum heimilar landsstýrisfólkinum at samstarva við Bygningsstyrelsen í Keypmannahavn um at útvega nýggjan bygning til Sjúklingahotellið. Hetta fyri at tryggja, at verkætlanin kann halda fram við næsta stignum, har arbeitt verður við skipanaruppskoti og verkætlanaruppskoti. Næsta stigið byrjar eftir ætlan í summar 2026

Sum útgangsstøði rindar landið ikki nakað fyri næsta stigið (fasa 1). Útreiðslurnar verða íroknaðar ein komandi leigukostnað. Steðgar samstarvið av onkrari orsøk, hevur landið tó eina møguliga skyldu at rinda fyri arbeiðið, sum er sett í gongd. Tí er neyðugt at hava eitt greitt heimildargrundarlag.

Í § 42 í stýrisskipanini er ásett, at lán, borgan ella aðrar skyldur, sum skuldbinda landsstýrið ella stovnar undir landinum, ikki kunnu verða tiknar uttan heimild í løgtingslóg. Tí er neyðugt at fáa orðað eina stutta heimildarlóg, sum verður løgd fram í hesari tingsetuni, og sum gevur landsstýriskvinnuni heimild at halda fram við arbeiðinum.

Málslýsing

Í desember 2023 fekk landsstýriskvinnan undirtøku fyri at fara víðari við møguleikanum at fáa til vega nýggj hølir til Sjúklingahotellið í Keypmannahavn á einum av grundøkjunum hjá Bygningsstyrelsen í Rådmandsgade. Bygningsstyrelsen tørvaði síðani eina heimild frá Transportministeriet fyri at fara undir eitt samstarv við føroyskar myndugleikar. Í juli 2025 fekk Bygningsstyrelsen ta neyðugu heimildina.

Í samsvari við niðurstøðuna á landsstýrisfundinum og heimildina frá Transportministeriet hevur Heilsu- og orkumálaráðið, saman við Fíggjarmálaráðnum og Sjúkrahúsverkinum, havt eitt innleiðandi samskifti við Bygningsstyrelsen um samstarv, arbeiðstilgongd og ráðgeving í sambandi við ein nýggjan bygning til Sjúklingahotellið.

Modellið, sum lagt verður upp til, er tað, sum vanliga verður nýtt fyri danskar almennar stovnar. Bygningsstyrelsen byggir og eigur bygningin og hevur ábyrgd av uttandura viðlíkahaldi og tekniskum høvuðsinstallatiónum, meðan landsstýrið leigar bygningin og hevur tær vanligu skyldurnar sum leigari.

Bygningsstyrelsen hevur eina 4-ára rammuavtalu við ein høvuðsarbeiðstakara. Tað merkir, at høvuðsarbeiðstakarin stendur fyri einari heildararbeiðstøku, sum fevnir um projektering, bygging og aðrar viðkomandi uppgávur.

Arbeiðstilgongd

Arbeiðið verður skipað í stigum í samsvari við almennu reglurnar um byggiverkætlanir, burtursæð frá, at sjálvt byggiarbeiðið ikki verður boðið út serstakt, tí tað er partur av rammuavtaluni, ið Bygningsstyrelsen hevur við høvuðsarbeiðstakaran.



Innleiðandi stigið
Fyrireikandi arbeiðið er sett í gongd, og innleiðandi stigið (initieringsfasan) er mett at kosta samanlagt umleið 800 tús. kr. Samlaða stigið (initieringsfasan) fevnir um:

- At skapa eitt fakligt og fíggjarligt grundarlag fyri víðari arbeiði við verkætlanini
- Nágreina tørvin hjá Sjúklingahotellinum, har krøv í sambandi við virksemi, støddd og skipan verða lýst
- Orða kravfesting, umframt leysligar metingar av kostnaði og tíðarætlan
- Innleiðandi stigið (fasa 0) endar við einari byggiskrá, og uppskot verður gjørt til politiska myndugleikan at taka støðu til, um verkætlanin skal halda fram

Farast kann undir hetta stigið (fasa 0), tá ið allir partarnir (landsstýrið, Bygningsstyrelsen og høvuðsarbeiðstakaran) hava góðkent gjaldsavtaluna. Heilsu- og orkumálaráðið samskiftir í løtuni við Bygningsstyrelsen um, hvørjar treytir eru fyri einum møguligum afturgjaldi.

Sum útgangsstøði rindar landið ikki nakað í hesum stigi. Danskir myndugleikar halda útreiðslurnar av verkætlanini. Útreiðslurnar verða íroknaðar ein komandi leigukostnað. Tó hevur landið eina møguliga skyldu at rinda fyri arbeiðið, sum er sett í gongd, um samstarvið av onkrari orsøk steðgar.

Um innleiðandi stigið steðgar, kann tað verða fíggjað innan fyri verandi rakstrarkarmar.

Næsta stig
Á hesum stigi verður arbeitt við skipanaruppskoti og verkætlanaruppskoti. Stigið fevnir um:

- At menna og nágreina verkætlanina til eitt støði, har hon kann leggjast fram til politiska og fíggjarliga viðgerð
- Skipanaruppskot verður ment, herundir arkitektoniskar og tøkniligar loysnir
- Kostnaðarmeting og meting um húsaleigu verða nágreinaðar
- Fyrireiking til myndugleikaviðgerð verður sett í verk
- Hetta stigið (fasa 1) endar við einum verkætlanaruppskoti, og uppskot verður gjørt til politiska myndugleika at taka støðu til, um verkætlanin skal halda fram

Farast kann undir stigið (fasa 1), tá ið allir partar (landsstýrið, Bygningsstyrelsen og høvuðsarbeiðstakaran) hava góðkent ætlanina fyri stigið. Bygningsstyrelsen metir, at hetta stigið væntandi kann byrja í summar 2026

Ein hóskandi karmur fyri stigið verður mettur til áleið 10 mió. kr.

Sum útgangsstøði rindar landið ikki nakað fyri næsta stigið (fasa 1). Danskir myndugleikar halda útreiðslurnar av verkætlanini. Útreiðslurnar verða íroknaðar ein komandi leigukostnað. Tó hevur landið eina møguliga skyldu at rinda fyri arbeiðið, sum er sett í gongd, um samstarvið av onkrari orsøk steðgar. Tí er neyðugt at hava eitt greitt heimildargrundarlag.

1.2. Galdandi lóggáva
Eingin løgtingslóg er galdandi hesum viðvíkjandi.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at heimila landsstýriskvinnuni at samstarva við Bygningsstyrelsen. Lógaruppskotið tryggjar, at verkætlanin kann halda fram við næsta stignum (fasa 1), har arbeitt verður við skipanaruppskoti og verkætlanaruppskoti.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Við hesum lógaruppskoti verður heimilað landsstýriskvinnuni at samstarva við Bygningsstyrelsen. Lógaruppskotið tryggjar, at verkætlanin at útvega nýggj høli til Sjúklingahotellið í Keypmannahavn kann halda fram við næsta stignum (fasa 1), har arbeitt verður við skipanaruppskoti og verkætlanaruppskoti. Samstundis verður í lógini ásett ein mesta upphædd á 10 mió. kr.

Sum útgangasstøðið rindar landið ikki nakað fyri næsta stigið (fasa 1), tí at útreiðslurnar verða eftir ætlan íroknaðar ein komandi leigukostnað. Tó hevur landið eina møguliga skyldu at rinda fyri arbeiðið, sum er sett í gongd, um samstarvið av onkrari orsøk steðgar. Tí er neyðugt at hava greitt heimildargrundarlag.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Lógaruppskotið er gjørt í samstarvi við Fíggjarmálaráðið. Mett verður ikki, at tað er neyðugt at senda lógaruppskotið til hoyringar.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Landið rindar sum útgangsstøði ikki útreiðslur sambært hesi lóg, men útreiðslurnar verða lagdar til grund fyri leigumál við landið, tá ið nýggjur bygningur til Sjúklingahotellið er klárur at taka í nýtslu.

Verður verkætlanin ikki førd til enda, og samstarvið av onkrari orsøk steðgar, hevur landið eina møguliga skyldu at rinda fyri arbeiðið, sum er sett í gongd. Útreiðslurnar sambært hesari lóg kunnu í mesta lagi verða 10 mió. kr.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Heilsu- og orkumálaráðið, Fíggjarmálaráðið og undirliggjandi stovnur fara at nýta arbeiðsorku til at luttaka í arbeiðsbólkum v.m.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri føroysku vinnuna. Tað er ein donsk fyritøka, sum stendur fyri arbeiðinum.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri samfelagsbólkar og felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

2.9. Markaforðingar og flytføri
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri markaforðingar og flytføri.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, tvingsilssektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið áleggur ikki skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Gjøld verða ikki áløgd sambært lógaruppskotinum.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur uppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur heimildir til landsstýrisfólkið at samstarva við Bygningsstyrelsen.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Heimilar uppskotið viðgerð av persónsupplýsingum?
Lógaruppskotið heimilar ikki viðgerð av persónsupplýsingum.

2.17. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.18. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar	[redacted]		Nei	Nei	[redacted]

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Við hesari áseting verður heimilað landsstýrisfólkinum at samstarva við danskar myndugleikar, t.e. Bygningsstyrelsen í Keypmannahavn, um verkætlan at útvega nýggjan bygning til Sjúklingahotellið í Keypmannahavn. Heimildin tryggjar, at verkætlanin kann halda fram við næsta stignum (fasa 1), har arbeitt verður við skipanaruppskoti og verkætlanaruppskoti.

Heimildin kann fevna um tíðarskeiðið fram til og við verkætlanaruppskot.

Verður verkætlanin ikki førd til enda, og samstarvið av onkrari orsøk steðgar, hevur landið eina skyldu at rinda fyri arbeiðið, sum er sett í gongd. Útreiðslurnar sambært hesari lóg kunnu í mesta lagi verða 10 mió. kr.

Til § 2
Gildiskomuáseting. Lógin fer úr gildi 1. januar 2029. Eftir ætlan verður komið á mál við næsta stigi í verkætlanini, ið fevnir um skipanaruppskotið og verkætlanaruppskotið, í 2027. Í sólseturásetingini er harumframt lagt er upp fyri møguligum seinkingum í verkætlanini.

Heilsu- og orkumálaráðið, 24.04.2026

Eyðdis Hartmann Niclasen
landsstýriskvinna

/ Bjørgfríð Ludvig